# Viðmerking til Eyðstein Poulsen, reiðara

BJØRN KALSØ
Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum



**Tann høgi marknaðarprísurin á skipum í dag er gott tekin um, at dugnalig vinnulívsfólk meta fiskivinnuna sum eina trygga og gevandi vinnu, og ber samstundis eftir míni meting eisini boð um, at eingin ótryggleiki valdar í fiskivinnuni**

Góði Eyðstein:

Í grein í bløðunum *"Bjørn Kalsø ein lemjandi ósigur fyri smáu reiðaríini"* finst tú at sitandi landsstýrismanni í fiskivinnumálum og leggur afturat, at undanfarnu landsstýrismenn hava megnað uppgávuna betur, tí teir hava ikki latið seg ávirkað av akademiskum kreftum.

Hvønn landsstýrismann Eyðstein heldur hava verið tann besta, fari eg ikki at leggja meg út í, tí vit liva tíbetur í einum demokratiskum samfelag, har hvør einstakur sjálvur kann gera sær sínar egnu metingar um dygdirnar hjá politikarum. Hesar metingar vilja sjálvsagt oftast vera merktar av egnum politiskum liti og áhugamálum, og eru tær tað óivað eisini í hesum føri.

Hinvegin fari eg at gera nakrar viðmerkingar til onnur sjónarmið, sum koma fram í nevndu grein.

Eyðstein sigur: *"at ótryggleiki valdar, og tí vilja tey flestu sleppa úr fiskivinnuni og selja"*. Um hetta hevði verið støðan, átti skipaprísurin at fallið munandi. Mín fatan er tann øvugta. Í mínum dagliga arbeiði merki eg væl, at tað er ein hópur av dugnaligum føroyingum, sum fegnir vilja sleppa inn í fiskivinnuna, so ótrygg kann henda vinna hóast alt ikki metast at vera í løtuni.

Rákið í tíðini innan so at siga alt vinnulív, bæði her heima og úti í heimi, eisini innan fiskivinnuna er, at eindirnar gerast alsamt størri. Tí er tað neyvan rætt bara at føra fram, at tað er førdi politikkurin hjá núverandi landsstýrismanni, ið er ein lemjandi ósigur fyri smærri reiðaríini, serliga tá hugsað verður um, at tað er í hesum samgonguskeiði, at støða varð tikin til at seta skott í lógina um vinnuligan fiskiskap, fyri at forða fyri, at allur útróðrarflotin hvarv upp í línuflotan. Varð hetta ikki gjørt eri eg vísur í, at eingin útróðrarbátur hevði verið eftir í flotanum í dag og harvið nógv færri smá reiðarí.

Fari til seinast at undirstrika, at eg ongantíð, hvørki í fjølmiðlum ella aðrastaðni, havi lagt reiðarar undir at vera bandittar, og tí skilji eg als ikki hví Eyðstein Poulsen, reiðari velur at hava tað sum evnið í grein har mítt yrkið sum landsstýrismaður verður viðgjørt. Eri hinvegin samdur við Eyðsteini í, at fiskivinnan er høvuðsgrundarlagið undir okkara búskapi, og fari eg tí framhaldandi at arbeiða fyri at skapa tryggar karmar um fiskivinnuna, vónandi øllum føroya fólki at gagni.

# Hoyvíkstjørn einaferð afturat

SVERRI PETERSEN





Nú í seinastuni hevur verið skrivað nakað um Hoyvíkstjørn. Men, tað sum er gjørt higartil, er alt í lagi, bara at hon ikki grinnast meiri, tí so verður hon oyðiløgd. Tí villdunnur, tær skulu hava vatn at standa upp og niður í. Og dykkontir skulu sanniliga eisini hava nakað av dýpi at kava í.

Men har sum fleiri kokkar eru, eru eisini fleiri uppskot, eitt av teimum er púra vilt. Og tað er sandskráningin frá gøtuni kring vatnið. Nú gera teir tað, at hvørki villdunnur ella dykkdunnur koma at hava skjól at liggja undir, tá nógvur vindur er á tjørnini. So eg og fleiri við mær meina, at tað er burturspilt arbeiði. Fyri tað fyrsta, so kemur sandurin ikki at liggja, tí er pálandsvindur á vatninum, so veit mann at tað skapar eitt ávíst rák út frá og út á miðjuna. Og so grynnist vatnið upp aftur meiri. So hatta er fullkomiliga burturvið, at hugsa um sovorðið. Tí tjørnin verður oyðiløgd.

So koma vit til sílini, tey skulu út aftur í tjørnina. Men eitt veit eg, at kemur sandurin – sum tað verður tosað um – so hava hvørki síl ella villdunnur ella dykkdunnur møguleika at leita sær skjól nakrastaðni á tjørnini. Eitt vita vit, at vit skapningar skulu hava nakað at goyma okkum undir. Nú hava vit ein stóran trupulleika av likkum, sum eru um tjørnina alt summarið og eg sjálvur og nógv við mær hava sæð likkur svølgt villdunnu ungar livandi. Síðsta ár kom eingin ungi undan umleið 80 villdunnum – so tað sigur ikki so lítið. Okkurt má gerast!

Á hólmunum báðum skal onkur lágur vøkstur gróðursetast, so tað skapar lívd hjá dunnunum, tá ið tær verpa. Og hetta er eisini ein fragd fyri eygað. Tí einaferð verður Tjarnagarður liðugur útbygdur, so har fara tey gomlu at síggja eina vakra tjørn við lívi í aftur.

Eg dugi ikki at síggja, hví tjørnin skal gerast til børn. Tað eru tjarnir og vøtn ikki gjørd til aðrastaðni. Vit skulu heldur gera tað onkra aðrastaðni til børnini. Og skal eisini uppslag setast á Hólmin – bannað at fara uppá!

# Takið kommunurnar við

HEÐIN MORTENSEN
Stýrisformaður í Kommunusamskipan Føroya



Endamálið hjá landsstýrinum við Visjón 2015 er at styrkja grundarlagið undir føroyska vælferðarsamfelagnum. Hesum tekur Kommunusamskipan Føroya (KSF) fult undir við. KSF umboðar uml. 70 % av íbúgvunum í Føroyum, og tí tekur KSF sjálvsagt virknan lut í øllum arbeiði at menna samfelagið sum heild.

KSF heldur, at samfelagið eigur at verða skipað greiðari og smidligari, og neyðugt er tí við greiðum ábyrgdarbýti millum land og kommunur. KSF leggur eisini stóran dent á, at kommunurnar skulu umsita tær uppgávur, ið beinleiðis eru viðkomandi fyri borgaran, tí kommunurnar eru betur førar fyri at nøkta ynski og krøv borgarans enn landið.

Fortreyt fyri hesum er eyðsæð burðardyggar kommunueindir, sum hava førleika at taka ímóti uppgávunum. Hetta hevur landsstýrið somuleiðis staðfest við kommunuálitinum.

KSF hevur samsvarandi hesum arbeitt áhaldandi við at fyrireika limakommunurnar til at taka ímóti størri umsitingarligum uppgávum. Eitt nú hevur KSF arbeitt við umfevnandi arbeiðsætlan, har mál verða sett fyri yvirtøkum av uppgávum og menning av umsitingarliga førleikanum úti í kommununum at røkja uppgávurnar.

Tí er tað ørkymlandi, at landsstýrið í ólavsøkurøðu løgmans onga ítøkiliga ætlan hevur um útlegging av uppgávum til kommunurnar. Ei heldur er nøkur ætlan um at skipa eina útleggingartilgongd at finna. Vit sakna eitt nú á útbúgvingar- og mentamálaøkinum ítøkiligar ætlanir um greiðari ábyrgdarbýti um fólkaskúlan, musikkskúlan, frítíðarundirvísingina, fólkabókasøvnini og bygdasøvnini. Á almanna- og heilsumálaøkinum sakna vit ætlanir serstakliga um eldraøkið.

Hetta eru alt týðandi øki úr rúgvuni, ið KSF í fleiri ár hevur strongt á landsstýrið um at fáa lagt út til kommunurnar at umsita. Tað undrar tó KSF, at landsstýrið í ólavsøkurøðuni tykist hava lagt allar ætlanir um útlegging av uppgávum til kommunurnar til viks.

Landsstýrið boðar tó í ólavsøkurøðuni frá, at ætlanin er at dagføra lógina um sjálvbodna kommunusamanlegging til tess at fáa eintýdda áseting av, hvørjar kommunalu eindirnar í framtíðini skulu vera, antin talan verður um samstarv ella samanlegging.

Hetta kann vera signal til kommunurnar um at fyrireika seg til komandi útleggingar. Vónandi er tað so. KSF er ikki í iva um, at útlegging av uppgávum til kommunurnar er lykilin til skipan av burðardyggum kommunueindum, sum aftur er grundarlag fyri einum betri skipaðum samfelag og betri tænastu til borgaran í einstøku kommununi. Tí er trupult at skilja, hvørjum landsstýrið bíðar eftir.

Tað er alneyðugt, at landsstýrið nú av álvara setur gongd á arbeiðið at fyrireika og fremja útleggingar. Tað er eisini alneyðugt, at landsstýrið í størri mun enn nú tekur kommunurnar við í lógarfyrireikandi arbeiðið frá byrjan. Í hesum er KSF altíð til reiðar at taka tøk saman við landsstýrinum.

